gult cyan magenta svart

VIÐMERKINGAR

Stutt svar til Jógvan Mørkøre til viðmerking í Sosialinum 3. nov.



Birgir Danielsen

Sambært »óhefta« samfelagsfrøðingin Jógvan Mørkøre følir onkur seg traðkaðan á tærnar í samband við ta samrøðu, sum eg hevði við Jan Müller, blaðstjóra á Sosialinum 1. nov.

Hví hesin »óhefti« Jógvan Mørkøre reagerar, sum hann ger, váttar bert tann mistanka, sum eg so leingi havi haft og er eingin orsøk til at gera viðmerkingar til tað.

Fyrsti spurningur Jógvan Mørkøre stillar: Hevur Landsstýrið ikki hildið seg til samgonguskjalið?

Svarið er: Jú, tað hevur tað í spurninginum um Fullveldið gjørt. Tó, nú meðan eg skrivi hetta, hoyri eg í útvarpinum, at ein kúvending er gjørd frá »loysing fyrst og danir gjalda yvirgangstíðina« til nú »eina longri yvirgangstíð og síðan loysing, tá yvirgangstíðin er liðug«.

Til alt hetta kann sigast at millum ár og dag eru gjørd nógv valupplegg og nógv samgonguskjøl og royndirnar um at liva upp til hesi lyfti og samgonguskjøl hava eydnast í størri ella minni mun.

Í hesum førinum hevur Landsstýrið gjørt nógv burtur úr tí eina punktinum í samgonguskjalinum, men lítið burtur úr restini.

Fyri meg og fleiri hevur ta verið eyðsæð, at royndir Landsstýrisins longu áðrenn fyrsta samráðingarfund ikki kundu føra á mál.

Tí haldi eg ikki tað vera nakað løgið í, at røddir eru frammi um at broyta kósina soleiðis, at vit fáa eina fólkaræðisliga tilgongd t.v.s, tað verður Føroya fólk – eisini sambands- og javnaðarfólk, sum skulu taka støðu til eina endaliga loysn, sum eisini er í samsvar við tað, sum løgmaður hevur endurtikið ferð eftir ferð: at fáast skal ein breið undirtøka.

Eitt annað mistak, sum er gjørt í hesum 1. upplegginum hjá landsstýrinum, er, at landsstýrið hevur roknað við at fáa hjálp frá donsku stjórnini at taka sjálvstýri.

Er hetta ikki heldur naivt?

Tað átti ikki at undra nakran, at danskir politikarar seta seg ímóti at Føroyar loysa frá Danmark. Hvørjar fylgir kann hetta fáa fyri Danmark í altjóða høpi? Verður hetta ikki eitt prestigutap hjá Danmark?

Annar spurningur: Er ein meiriluti innan Fólkaflokkin farin undir at endurskoða tað, flokkurin fór til val uppá?

Eg kann ikki svara fyri um ein meiriluti av flokkinum er farin í holt við hetta ella ei. Men tað eru nógv fólkafloksfólk og onnur við, sum spyrja seg sjálvan um valda mannagongd er røtt. Svarið til spurning 1 omanfyri tíðir uppá, at henda mannagongd førir ikki á mál, sum løgmaður eisini hevur váttað 2. nov. kl. 16.

Katrin gloymir skjótt



Leivur Hansen
borgarstjóri

Katrin Dahl, sum eftir 12 (ella rættari 11) ár sum býráðslimur nú takkar fyri seg, leggur í eini »áheitan« í valblaði fólkafloksins okkum í tjóðveldisflokkinum undir at hava ábyrgdina av, at »henda seinasta býráðssetan ikki hevur víst stabilitet«.

Her má bila við minninum hjá góðu vinkonu míni, tí høvuðsorsøkin til óstabilitetin hevur júst verið at finna í hennara egna flokki – fólkaflokkinum.

Tað byrjaði við, at tvey av teimum fýra fólkafloksumboðunum á vári 1998 rýmdu av skútuni, tá teir ikki fingu okkum onnur til at taka undir við tilmæli teirra um at taka av einum tilboði um graslíki til ovara vøll í Gundadali og vøllin á Argjum, sum var hálvaaðru miljón krónur dýrari enn lægsta tilboðið!

Tað eydnaðist okkum kortini, við mikið stríð og strev, at fáa drigið annan teirra inn um aftur í samgonguna, soleiðis at vit framhaldandi høvdu meirilutan í býráðnum.

Hetta var tó ikki nógmikið til, at samgongan kundi varðveita allar nevndarformanssessirnar, tí minnilutin fekk nú – saman við fólkafloksumboðnum, ið »slapp« – meiriluta í fleiri nevndum.

Hetta kostaði Katrini Dahl formanssessin í heilsu- og umhvørvisnevndini, tjóðveldisflokkinum formannin í mentamálanevndini og javnaðarflokkinum formannin í sosialu nevnd.

Hesum kundi javnaðarflokkurin ikki liva við, og tá minnilutin eitt ár seinni bjóðaði honum sosialnevndarformanssessin aftur, um hann afturfyri kom yvirum til teirra, stakk hann í sekkin og fór.

Hetta hevði við sær, at fólkaflokkurin nú eisini misti formannin í byggi- og býarskipanarnevndini.

Undir viðgerðini í fjørheyst av uppskotinum til fíggjarætlan fyri í ár, tók fólkaflokkurin okkum enn eina ferð øll á bóli við einvíst at kunngera, at nú skuldi skatturin niður við einum prosenti.

Eitt av málum samgongunnar var at virka fyri lægst møguligum skattatrýsti. Men hvørki vit ella hinir flokkarnir hildu røttu løtuna enn vera komna til at lækka skattin, havandi stóru skuldarbyrðuna og støðugt vaksandi íløgutørvin í huga.

Men fólkaflokkurin var hvørki at høgga ella at stinga í, og tí gjørdu vit í tjóðveldisflokkinum av at taka av tilboðnum frá hinum flokkunum um at kasta saman við teimum og soleiðis fáa stabilitet í aftur.

Hetta hendi fyri sløkum ári síðani, og síðani hava vit ikki sæð í halaferðina á Katrini aftur.

Hvussu leingi tola føroyingar loysingarsamgonguna, ið bert leggur óneyðuga tunga byrðar á føroyingar!

Marjus Dam
Løgtingsmaður

Tolið man vera við at vera brúkt hjá flestu føroyingum. Hendan samgonga hevur óneyðugt píska føroysku arbeiðsmegina við at vinda skatt og avgjøld úr hesari.

So álvarsliga er farið til verka, at 500.000.000 kr. (500 milliónir kr.) ella 40.000 kr. eru tiknar ov nógv frá hvørjum einasta húski seinastu árini. Og hugurin tykist bert verða at herða kvørkratakið á føroyska arbeiðaran, handverkaran, skrivstovufólki, sjúkrasystrina, sjómannin. Ja, øll.

Flestu fólk, ið fáa sína løn eru ikki so misnøgd við hesa, men eftir at loysingarsamgongan hevur verið eftir tolli og avgjøldum, so er møguliga eftir til mjøl og vatn hjá vanliga føroyinginum – ímeðan Landskassin er við at flóta ivir í ríkidømi. Og viljin hjá loysingarsamgonguni at taka minni inn frá føroyingum, tykist ikki vera til staðar – tvørturímóti.

Tað er bert ein vegur at ganga á hesum øki, og tað er at lækka skattirnar av einari einfaldari orsøk. Teir eru ov høgir. 40.000.00 kr verður kravt inn ov nógv ímeðal fyri hvørt húski árliga.

Um Løgtingið ikki ger nakað ítøkiligt við hesi viðurskiftir, so vóni eg at føroyingar og fakfeløg gera taðneyðuga. Soleiðis at hendan samgonga verður noydd at leggja frá sær.

Tað kann ikki vera rætt, at øll saft og kraft skal drenast úr føroysku arbeiðsmegini niður í landskassan.

Føroyingar – latið okkum standa saman um at fella hesa samgongu.

Ikki samband ella fullveldi

Ása Olsen
valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreym

men menn og kvinnur, ið vilja bróta upp um armar, og fara inn og loysa teir trupulleikar, ið sitandi býráð ikki hevur megna

Tað er ein sannroynd, at tørvurin á røktarheimsplássum kring landið liggur um 500-600 pláss, og er sjálvandi ein stórur partur her í Havn.

Hvar og undir hvørjum umstøðum eru hesi fólk? Heimarøktin er einasta stað tey kunnu fáa hjálp, og so við og við sum talið veksur á hesum tørvi, alt meðan Heimarøktin ikki fær tilsvarandi hækkan í síni játtan, so verður hjálpin eisini hareftir.

Ein má bara ásanna, at høvdu vit ikki havt starvsfólk í Heimarøktini í dag, við royndum og vilja til at fáa tingini til at fungera, so hevði verið illa vorið.

Tað er ein sannroynd, at bert tey fysiskt og phsykiskt sterku starvsfólkini klára trýstið, ið tað er, at renna hús úr húsið, altíð í tíðarneyð, og altíð at hava følilsi av, at ein ikki nær tað ein ynskir, tí at tørvurin bert verður størri og størri. Minnast skal eisini til, at tað er ikki sum á einum røktarheimi, at ein vakt avloysir eina aðra, og vit eru heldur ikki komin so langt, at vit kunnu veita hesum fólkum hjálp allar tíðir á døgninum. Nei í nógvum førum veit heimahjálpin tá hon hevur verið og hjálpt einum brúkara í song, at ongin kemur aftur fyrr enn næsta morgun.

Sum eg áður havi skrivað, so er bert eitt eldrasambýli í kommununi, og er tað greitt, at um býráðspolitikkarir høvdu havt vilja til at loysa teir stóru trupulleikarnar á eldra økinum, vóru minst fýra sambýlir í kommununi.

Tað er so lætt at koma við yvirskriftum, sum at vit ikki gloyma okkara gomlu o. s. fr. men tað er ein sannroynd, at tað er langt ímillum orð og gerð hesum viðv.

Ein fær eisini tað hugsan, serliga nú tosa hevur verið um kvinnur í politikki, at tað møguliga er tað, at tann kvinnuligi parturin manglar í hesum samanhangi.

VIÐMERKINGAR

Klaksvíkar Havn

Steinbjørn O. Jacobsen,
varaborgarstjóri

Lati› okkum nú eina lítla løtu dvølja vi› Kaksvíkar Havn, sum er merkt av stórum virksemi› og sum er so tætt kn‡tt at lívsæ›r okkara »Fiski og alivinnuni«.

Lat meg siga beinavegin, at Klaksvíkar Havn skal mennast til at vera fram um a›rar havnir í Føroyum tann førandi Havn tá um fiski og alivinnuna ræ›ur.

Og tí eiga vit at spyrja:

Er Klaksvíkar Havn ta› hon kann at ver›a? Eg hugsi at vit samd kunnu svara, at ta› er hon ikki.

Hvat eigur so at ver›a gjørt fyri at Klaksvíkar Havn kann gerast meiri virkin og kann hava størri útbo›.

Alivinnan: Alivinnan sum er blivin ein so t‡dningarmikil vinna, sum gevur stórt avkast, sum kemur okkum øllum til gó›a. Alivinnan eigur av Klaksvíkar B‡rá› at fáa tær sømdir sum krevjast bæ›i á landi og vi› bryggjukantin. Og her er ney›ugt vi› tøttum samstarvi› so vit kunnu náa máli›.

Útró›rarvinnan, lína og trol. Umstø›ur teirra eru ikki nøktandi, tí eigur enn dyggilagari at ver›a tiki› um umstø›ur teirra.

Umstø›urnar hjá trolbátunum at arbei›a trol teirra á landi› eru syndarligar, og ta› má sum skjótast fáast ein loysn á hesum trupulleika, so tørvur teirra ver›ur nøkta›ur. Eisini eigur Kommunan at halda áfram at betra um tørvin hjá línu og snellubátunum, sum er tann stórri partur av útró›rarflotanum. Tá vit so hugsa um smábátaumstø›urnar, serliga vi› bátahylin á Bor›oyavík, eru umstø›urnar har sera ótryggar, har má bøtast um vi›urskiftini.

Farmavinnan: Av og á skipanin innan farmavinnuna er ikki nøktandi, og her mugu vi›urskiftir fáast uppá pláss, so stórri avskipan fer fram av byngjuskipum frá Klaksvíkar Havn og ikki sum í dag, har stórur partur fer› vi› strandfer›sluskipinum, sum vi›førir, at Klaksvíkar Kommuna missir stórar inntøkur.

Fer›afólkaflutningurin: Klaksvíkar Kommuna má leggja størri tr‡st á Strandfaraskip Landsins at fáa fer›afólkavi›urskiftini á eina tryggari legu, t.d. má sum skjótast gerast ein n‡ggj landgongd til Dúgvuna, tí her er bert spurningur um tí›, at ein vanlukka hendir á dekkinum, har lastbilar, trailarar, persónbilar og fer›afólk er hvørt um anna› vaft, harafturat er ikki lætt at ver›a manning, sum hevur eina veldugа ábyrgd í hesum vánaligu umstø›um.

Framlei›sluvinnan: Vit hava í dag fleiri virksom virkir á havnaøkinum, og her mugu betri vi›uskifti fáast, vi› t.d atkomumøguleikum, o. ø. og eisini mugu tey fáa tær tænastur i› Kommuna kann veita

Ta› er av sera stórum t‡dningi at karmarnir eru í lagi› til okkara egnu fyritøkur, á›renn vit markna›arføra út um okkum.

Eitt er liggur eisini púra fast, ta› er, at fiskaframlei›slan og okkara fiskifør skullu hava sítt virksemi› inni á Klaksvíkini. So leingi sum øll farmalei›in ver›ur avgreidd inni á vánni, er ógjørligt vi› tí virksemi› sum er í dag, at skapa nóg gó›ar umstø›ur hjá primervinnu okkara.

Gó›shavnin í Ánunum má og skal gerast n‡tilig vi› atløgumøguleika vi› 12 metra d‡pi, og bingjuøki›, sum nøktar tørvin.

Vit eiga heldur ikki at liggja á koddanum tá vit hugsa um oljuvinnuna, men fylgja gjølla vi›, hvat hendir á økinum, so vit eisini eru tilrei›ar til hesa stóru avbjó›ing.

Samb‡li› á Argjum

Sólborg Dulavík,
valevni Sjálvst‡risflokksins til kommunuvali› í Tórshavnar Kommunu

Vit hava øll eitt ynski um at liva leingi, og tey, i› granska aldur siga og vita, at vi› tí framgongd í trivna›inum, sum hevur veri› hesi seinastu mongu árini, so gerast fólk eldri og eldri. Veruleikin er sostatt tann, at ta› ver›a fleiri gomul fólk í okkara vælfer›arsamfelagi›.

Men hvat ger ta› vi› okkara samfelag. Í langa tí› hevur ta› veri› skriva og tosa um hvussu stórir trupuleikar eru innan eldrarøkt og um hvørji, tilbo› ella ikki tilbo›, eru til tey gomlu. Hóast hetta prát, sum er veruleikin tann at alt ov fáir møguleikar eru.

Vit tí práti, sum gongur fyri seg, so fær ein fatan av at skuldin liggur í, at ta› eru so nógv gomul.

Ta› kann ikki vera rætt, enn minni sømuligt, at so er.

Tey, i› rá›a fyri borgum eiga at seta seg ni›ur og gera naka› vi› vi›urskiftini hjá teimum gomlu.

Sum dømi kann nevnast at úti á Argjum hev›i veri› hóskiligt, at álvari bleiv gjørdur úr a fingi› eitt samb‡li, og av gó›um grundum er hetta mín stóri áhugi.

Vit eiga sum skjótast at fáa hetta til veruleika.

Sjálvandi ynskja tey allar flestu at vera í egnum heimi sum longst. Ta› kundi eisini veri› gjørt nógv meira, fyri at fólk kunnu vera heima sum longst. Ta› ver›a altí› nøkur, sum hava tørv fyri hjálp, bæ›i tí tey ikki megna at taka hond um seg sjálvan, ella at einsemi ger tilveruna so ómenniskjaliga og dapra.

Ein áheitan til allar gó›a kreftir – seti tey eldru fremst á listan. Ta› kemur okkum øllum til gó›ar. Tí her kunnu vit øll fáa sama rætt. Og veruleikin er tann, at liva vit, so ver›a vit øll gomul einafer›, uttan mun til, hvussu vit hava havt ta› frammanundan.

Øll hava tørv á tryggleika, umsorgan og kærleika. Fólk skullu sostatt hava tí› og umstø›ur fyri at hetta skal lata seg gera.

Vit í Sjálvst‡risflokkinum vilja framhaldandi arbei›a fyri, at tey eldru ver›a meira hoyrd og, at tey sjálvi sleppa at siga frá teirra tørvi; óansæ› hvussu ymiskur tørvurin nú kann ver›a.

Nýggj SMS (Short Message System)-støð hjá Føroya Tele

Sig tað bókstaviliga

Tann 1. november lat Føroya Tele sína egnu SMS-støð upp í Føroyum, soleiðis at tað nú er møguligt hjá øllum GSM-felagum hjá Føroya Tele at senda og móttaka tekstboð um fartelefonina...

Sig tað við bókstavum
Við SMS kanst tú senda og móttaka tekstboð um tína fartelefon - og tað er sera lætt. Men áðrenn boð kunnu sendast, skal tað nýggja nummarið á SMS-støðini tastast inn í fartelefonina. Nýggja nummarið er

+298249020

Í vegleiðingini til fartelefonina sæst hvussu hetta verður gjørt. Tey, ið áður hava sent SMS-boð um tað íslendsku støðina (+354 8900100), skulu sostatt broyta hetta nummarið til +298249020.

Tað kostar bert 0,90 kr.
Í sambandi við ta nýggju SMS-støðina verður prísurin á SMS-boðum eisini settur niður. At senda eini SMS-boð kostar nú einans 0,90 kr. fyri hvørt boð frá øllum GSM-haldum - íroknað Føroya Teletíð haldum. Tað er líkamikið, nær boðini verða send og um boðini verða send innanlands ella til útlond. Tað er ókeypis at móttaka eini SMS-boð.

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo

So bíligt er tað!
Landsimi 1,50 kr. • TeleDanmark 1,00 kr.
*• TeleNor 0,93 kr. • Telia 1,30 kr. • **Føroya Tele 0,90 kr.***
(Omanfyri sæst hvat tað kostar at senda eini tekstboð við einum teletíðarhaldi í hinum norðurlondunum samanborið við kostnaðin hjá Føroya Tele - pr. 30. okt. 2000)

petur & petur • 320870

gult cyan magenta svart